## Nýggj handilsruta

Grønlendingar halda seg hava fingið væl burtur úr einum átaki, sum teir júst hava havt í Washington í USA. Millum luttakararnar vóru Royal Greenland, Air Greenland og grønlendska ferðavinnu- og vinnuráðið, og endamálið var at kunna amerikanarar um, hvat tað grønlendska samfelagið hevur at bjóða. Grønlendingar hava serliga góða vón um, at tann nýggja flogrutan millum Grønland og Amerika fer at økja samhandilin við USA.



## Burtur við halgidegi

Danski vinnulívsfelagsskapurin Dansk Erhverv heitir nú á landsins myndugleikar og fakfeløgi um at strika Dýra Biðidag sum halgidag og frídag. Tað er sum vera man tað seinna, sum hevur felagsins áhuga, tí allir eykadagar eru kærkomnir í hesum tíðum,. sigur felagið. Ein búskaparfrøðingur hjá Dansk Erhverv, Jenhs Brendstrup, sigur við tíðindastovuna Ritzau, at ein strikaður halgidagur svarar til 10.476 fulltíðarstørv hjá tí almenna.




*Enn ein syndarlig ferðsluvanlukka er hend á vegastrekkinum millum Havnina og Signabøartunnilin – og hvítusunnudag kostaði vanlukkan einum eldri hjúnum lívið. Grái bilurin, sum sæst á myndini, koyrdi í skeivari síðu, tá vanlukkan hendi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skilaleys koyring var orsøkin

**- Blóðroynd av kvinnuni, sum koyrdi bilin, ið var á veg norðureftir, er send til kanningar. Hetta er ein kanning, sum vit altíð gera undir slíkum umstøðum. Enn vita vit einki at siga um orsøkina til, at 25 ára gamla kvinnan koyrdi so skilaleyst og fyrilitarleyst hendan dagin, sigur Rani Wardum, vaktleiðari á politistøðini**

VANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir avhoyringar av vitnum í sambandi við ferðsluvanlukkuna við Sandvíkarhjalla hvítusunnudag, er løgreglan ikki í iva um, at bilførarin, sum hesa løtu var á veg norðureftir, koyrdi rættiliga skilaleyst og fyrilitarleyst. Hetta var orsøkin til vanlukkuna, sum kostaði einum eldri hjúnum lívið.

Kvinnan var einsamøll í bilinum á veg norður úr Havnini.

- Vitnir, sum vit hava tosað við, siga, at koyringin norðureftir var fullkomiliga skilaleys. Kvinnan yvirhálaði fleiri bilar og onkur, sum koyrdi 80 km/tíman, sum er mest loyvda ferð á vegastrekkinum, hevur sagt, at bilurin streyk fram við.

### Yvirhálaði í høgru

Rani Wardum sigur, at tey eisini hava tosað við vitnir, sum siga, at kvinnan yvirhálaði tann eina bilin í skeivari síðu á veg niðan gjøgnum brekkuna eftir oman koyringina til Hvítanesar.

- Hví hon gjørdi tað, vita vit ikki við vissu. Sambært vitnum kann orsøkin vera, at hon hevur havt so nógva ferð, tá hon er komin innaftur eftir eina yvirháling, at hon hevur valt at yvirhálað í skeivari síðu fyri ikki at koyra á bilin frammanfyri.

Tá vit tosaðu við Rana í morgun, hevði løgreglan ikki avhoyrt gentuna, sum framvegis var innløgd á intensivari deild á Landssjúkrahúsinum.

- Vit skuldu frætta aftur nú um 11-tíðina, nær avhoyringin kann fara fram, sigur hann.

### Vanlukkan hendir

Syndarliga vanlukkan hendir, tá gentan fer undir enn eina yvirháling, og tá er tað, at bilurin við eldru hjúnunum og einum abbasoni er komin um hesar leiðir – á veg til Havnar.

- Kvinnan yvirhálar nú á einum vegastrekki, har sýnið ikki er til yvirháling. Hon er tí úti í vinstru síðu á vegnum, tá bilurin við hjúnunum og abbasoninum er á veg suðureftir – og tá hendir vanlukkan, har bilarnir renna frontalt saman.

Rani sigur, at tað var eldri maðurin, sum koyrdi bilin, ið var á veg suðureftir. Konan sat á setrinum við síðuna av og abbasonurin, sum slapp við onkrum minni snuddi, sat aftanfyri. Ungi maðurin varð útskrivaður av Landssjúkrahúsinum seinni um kvøldið.

- Vit kunnu bara staðfesta, at skilaleys og fyrilitarleys koyring var orsøkin til hesa syndarligu ferðsluvanlukku, sum kravdi tvey mannalív, sigur løgreglumaðurin.

### Blóðroyndin kannast

Rani Wardum sigur, at blóðroynd er tikin av kvinnuni og er send til Danmarkar til neyvar kanningar.

- Hetta er ein kanning, sum vit altíð gera undir slíkum umstøðum. Vit hava ikki havt høvi at tosað við kvinnuna enn og vita tískil heldur einki at siga um, hví hon koyrdi, sum hon gjørdi.

Hann vísir á, at hetta er fjórða vanlukkan á vegastrekkinum millum Havnina og Signabøartunnilin upp á lutfalsliga stutta tíð.

- Tað nyttar so lítið, at vegirnir eru góðir, um fólk ikki eru nóg ansin og vísa fyrilit í ferðsluni. Orsøkirnar kunnu vera ymiskar, men avleiðingarnar eru altíð vanlukkuligar, tá ringast vil til. Umráðandi er, at allir bilførarar eru árvaknir og hugsa um, hvat frammanfyri er, leggur hann aftrat.

Løgreglan fer í vikuni at taka støðu til um kvinnan, sum koyrdi vanlukkubilin, skal skuldsetast fyri óviljað manndráp.

- Í Danmark verða fólk, sum vegna skilaleysa koyring eru orsøkin til slíkar vanlukkur, altíð skuldsett fyri óviljað manndráp. Men tað verður so dómarin, sum í seinasta enda tekur hesa avgerðina, sigur Rani Wardum, løgreglumaður og vaktleiðari á politistøðini í Havn.